## Bymar skoraði sigursmál

Jacob Bymar, sum hevur spælt fyri KÍ og B68, skoraði sigursmálið, tá ið Varde spældi í trðibestu deildini í Danmark leygardagin. Varde var á útivølli ímóti næstbesta liðnum hjá AaB. Tað kom bert eitt mál í dystinum, og tað skoraði Jacob Bymar, tá ið 52 minuttir vóru farnir av dystinum. Bymar hevur skotið fleiri mál fyri Varde seinastu vikurnar.




## Tem setti brotsspark í málið

Tem Hansen, sum nakrar ferðir hevur verið í føroyska landsliðshópinum, skoraði í gjár fyri Søllerød-Vedbæk í triðbestu donsku fótbóltsdeildini. Søllerød-Vedbæk fekk brotsspark í fyrra hálvleiki, og Tem Hansen setti bóltin í málið úr ellivu metrum. Søllerød-Vebæk skoraði trý mál afturat og vann dystin ímóti Greve 4-1.

# profilum



*Um eina viku setir Brian Kerr navn á spælararnar, sum manna fyrsta føroyska bruttohópin undir hansara leiðslu. Higar til hevur hann verið væl nøgdur um tað, sum verður lagt fyri dagin í føroyskum fótbólti, men hann staðfestir samstundis, at summir profilar áttu at verið betur fyri*

mugu sera hart við. Vit kunnu ikki betra teknikk og talent, tá vit savnast í nakrar fáar dagar, so spælarar mugu ansa sær sjálvum, so teir eru nóg væl fyri.

- Tað krevur so eisini av spælarunum, at teir liva sera disciplinera, og eg má siga, at onkrir teirra hava skuffað meg eitt sindur í so máta. Tí spælarar, sum hava verið fastur partur av landsliðnum í fleiri ár, eiga at vera betur fyri, enn summir teirra eru í løtuni. Og nú er sera trupult at betra um hetta, tí dystirnir eru somikið tættir, og tá spælararnir samstundis arbeiða við síðuna av fótbóltinum, er ikki nógv tíð til venjing. Men hetta er so ein av tættunum, sum vit mugu arbeiða við, og sum kann betrast.

*Og tað er væl ikki nakað, sum tú fært gjørt so nógv við her og nú ella upp á ein mánað ella so?*

- Nei. Men sum spælari kanst tú altíð gera títt kortini. Við at eta rætt og liva rætt til dømis. Tað snýr seg um broyta fleiri smærri ting, soleiðis at tú kanst røkka tí stóra málinum. Og eisini hjá yngru spælarunum hevur hetta ovurstóra týdning. Yngru landsliðini hava eisini stórar og truplar uppgávur fyri framman, so tað krevur veruliga, at spælararnir vilja vera við, um teir skulu røkka nøkrum.

- Samstundis má eg siga, at eg eri imponeraður av onkrum av teimum yngru spælarunum. Sjálvt í gjár (leygardagin, blðm.), tá eg hugdi eftir HB og VB í 1. deild. Har vóru fleiri spælarar, sum sýndu sera góð evni.

# Savnast 2. juni

**Brian Kerr leggur stóran dent á, at hann sleppur at hitta allar spælararnar, áðrenn fyrireikingarnar til Serbia-dystin veruliga fara ígongd**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um eina viku tekur Brian Kerr fyrsta bruttohópin til A-landsliðið út.

- Vit hittast fyrst 2. juni. Tá venja vit í tveir dagar, og eftir tveir frídagar hittast vit aftur til endaligu fyrireikingarnar til dystin móti Serbia. Tað gevur mær so eisini møguleikan at hitta hópin og tosa við spælararnar, áðrenn vit veruliga fara undir fyrireikingarnar til dystin móti Serbia. Eg havi sjálvandi tosað við fleiri av spælarunum, men mær dámar best, at vit fáa tveir dagar saman so skjótt, sum tað ber til, sigur Brian Kerr.

*Og at byrja við Serbia. Tað verður væl neyvan truplari enn tað sama?*

- Í løtuni eru teir fremst í bólkinum, og teir hava spælarar, sum spæla við teimum bestu í Europa. Men teir eru undir trýsti frá Fraklandi, so sjálvandi koma teir her fyri at vinna.

- Hinvegin havi eg sæð okkara dyst í Serbia, og har stóð føroyska liðið seg væl. Kanska skaptu okkara menn ikki so nógv frameftir, emn í verjupartinum stóð liðið seg væl, og tað var ikki fyrr enn seint í dystinum, tá Føroyar spældu við 10 monnum, at Serbia skoraði til 2-0.

- Men tað er sjálvandi eitt klassalið við klassaspælarum. Og eftir hetta skulu vit spæla móti Fraklandi. So talan er um sera trupult lutakast. Sjálvandi vil tað altíð verða tað, tá vit eru styrkismettir í lægsta pottinum, men Rumenia, Serbia, Frakland og Eysturríki vóru øll við í seinasta endaspælinum, so talan er um serstakliga truplar dystir.

- Men hava eisini okkara styrki. Ikki minst viljan og dirvi, og við spælarum, sum sýna ta entusiasmu, sum mær dámar so væl, so vilja vit avgjørt gera okkara.

- Og so vóni eg, at fólkið er við okkum. Eg veit, at áskoðararnir ikki hava verið so nógvir seinastu tíðina, men vónandi verður liðið stuðlað væl og virðiliga av áskoðarafjøldini. Sjálvur gleði eg meg í øllum førum, nú seinastu fyrireikingarnar standa fyri framman, og eg gleði meg serstakliga nógv til dystirnar, sigur Brian Kerr.